# Fyrsta filmskvøldið á Sirkus í kvøld

Sirkus niðri í Vágsbotni er farið undir at hava nakrar fastar hendingar um vikuna. Ein av teimum er filmskvøld hvørt týskvøld, ið tey kalla Sirkus Bio. Fyrsta filmskvøldið verður í kvøld kl. 21.00 á ovastu hæddini á staðnum. Fyrsti filmurin, ið verður sýndur, er dokumentarurin Heima, ið er um Sigur Rós og eina konsertferð, sum bólkurin hevði kring Ísland í 2006. Aðrar vikuligar hendingar, ið Sirkus hevur frá nú av og frameftir, er Red, White & Cheese hvørt mikukvøld, har tey hava tilboð uppá reytt- og hvíttvín, umframt keks og ostar, um man hevur hug. Hósdagar er live tónleikur á skránni við spennandi tónleikabólkum, og í vikuskiftunum eru tað bestu diskararnir bæði her á landi og uttanfyri, ið eiga pallin.




# Oljuprísurin hækkar framvegis

Oljuprísurin hækkaði í gjár. Ein tunna varð í gjár seld fyri 83,58 dollarar pr. tunnu. WTI-oljan verður seld fyri 83,58 dollarar pr. tunnu í New York í morgun eftir eina hækking á 69 cent, meðan Brent oljan er hækka við 74 cent til 82,11 dollarar pr. tunnu. - Tað eru fleiri tekin um, at kreppan er um at hæsa av og at búskapurin í USA er við at koma fyri seg aftur. Samstundis hevur tað verið kalt í USA, og hevur hetta eisini verið viðvirkandi til ein hækkandi oljuprís, sigur Ben Westmore, serfrøðingur við Bloomberg News. Til samanberingar kann nevnast, at fyri góðum árið síðani var prísurin á WTI oljuni 36 dollarar pr. tunnu.

# Upphavsrætturin komin á føroyskar hendur

**1. januar í kom málsøkið »upphavsrættur« kom á føroyskar hendur. Í hesum sambandi hevur Mentamálaráðið sent út kunningarskriv**

UPPHAVSRÆTTUR
*Tíðindaskriv*




Upphavsrættur varð 1. januar 2010 føroyskt málsøki, og Mentamálaráðið heitir á øll áhugað um at vera við til at endurskoða verandi skipan, nú føroysk løggáva skal gerast á økinum. Galdandi danska lógin um upphavsrætt verður verandi í gildi, til nýggj løgtingslóg um upphavsrætt verður sett ístaðin.

Lógin um upphavsrætt tryggjar rithøvundum og listafólkum lógarfest einkarættindi til vard verk ella framleiðslur. Lógin hevur ásetingar um nýtslu av vardu verkunum og ásetir eisini t.d., at rættindahavararnir hava rætt til samsýning fyri nýtslu av verkunum. Vanligt er, at rættindahavarar skipa seg í felagsskapum, ið varða av rættindunum teirra vegna.

Mentamálaráðið fær ábyrgd av nýggja málsøkinum og vil nýta høvi at endurskoða alla skipanina við innkrevjing av gjøldum, sum verða kravd sambært lógini og at tryggja gjøgnumskygni við skipanini.

- Mentamálaráðið ger í løtuni uppskot til broytingar í verandi lóg (Anordning nr. 1003 frá 11. december 2001 om ikrafttræden for Færøerne af lov om ophavsret), soleiðis, at hon skjótast til ber verður lagað til føroysk viðurskifti.
- føroysk loysn í mun til møgulig trætumál.
- kravd lógarbroyting til tess at liva upp til altjóða sáttmála á økinum.

- Arbeitt verður við at gera uppskot til eina nýggja løgtingslóg um upphavsrætt.

- allir áhugabólkar fáa høvi at gera viðmerkingar.
- ætlanin er, at felagsskapir, rættindahavarar og brúkarar skulu vera við í hoyringarbólkum, sum skulu hava fundir um ávís evni, sum løggávan fevnir um.

Hóast upphavsrætturin er skipaður við lóg, eru tað rættindahavararnir, sum gera av, hvussu virksemið við innkrevjing og útgjaldi av gjøldum skal vera. Eftir yvirtøkuna skal Mentamálaráðið tryggja eftirlit og gjøgnumskygni við virkseminum hjá fyrisitingarligu felagsskapunum, ið virka á føroyska marknaðinum.

Higartil hava donsku felagsskapirnir Koda og Gramex í Danmark virkað á føroyska marknaðinum við loyvi frá danska mentamálaráðnum. Koda umboðar tónaskøld, sangskrivarar, teksthøvundar og tónleikaforløg. Gramex umboðar sangarar, tónleikarar og plátufeløg.

Mentamálaráðið hevur gjørt av at geva Koda og Gramex tíðaravmarkaða góðkenning galdandi frá 1. januar 2010 til 31. desember 2010.

Felagið Fjølrit er felag fyri føroyskar rættindahavarar til listaverk og onnur hugverk. Fjølrit virkar fyri áhugamálum hjá rættindahavarum og umsitur pengingin, sum kemur inn fyri nýtslu av vardum listaverkum. Fjølrit, sum umboðar ein týðandi part av føroyskum rættindahavarum á økinum, hevur í dag heimild í lógini at samráðast og gera sáttmálar um loyvi til at fjølrita verk hjá limunum.

Mentamálaráðið ætlar:

- at Fjølrit, sum umboðar fyri ein týðandi part av rættindahavarunum, skal hava góðkenning frá landsstýrismanninum frá 1. januar 2011 at rokna. Hetta verður gjørt fyri, at Mentamálaráðið kann hava eftirlit við virkseminum, og harvið verður hetta rættindaøkið eisini javnsett tónleikaøkinum.

- at heita á felagsskapir og rættindahavarar sum heild at umhugsa, hvørt tað eisini eftir 31. desember 2010 skulu vera Koda og Gramex, sum umsita teirra rættindi.

- at heita á rættindahavararnar at umhugsa, hvørt tað eisini eftir 31. desember 2010 skal vera Fjølrit, sum umsitur teirra rættindi.

Hevur tú ella tann felagsskapur, tú ert limur í, áhuga í at luttaka í arbeiðinum at smíða nýggju lógina um upphavsrætt og vera við til at endurskoða verandi skipanir, kanst tú vinarliga senda teldupost til mmr@mmr.fo ella skriva til Mentamálaráðið.

Mentamálaráðið vónar, at rættindahavarar á øllum rættindaøkjum fara at nýta høvi at taka lut í hesum endurskoðanararbeiði, soleiðis at upphavsrætturin kemur at virka á øllum rættindaøkjum.

# Vænta loysn á prestaósemjuni í hesi vikuni

**Mentamálaráðið arbeiðir við at loysa trætuna um prestastarvið í Hvalba, og ætlanin er at finna eina loysn í hesi vikuni, sigur landsstýriskvinnan í mentamálum**

FÓLKAKIRKJA
*Árni Joensen*
*arni@sosialurin.fo*

Í tíðindaskrivi í kvøld ásannar Helena Dam á Neystabø, landsstýriskvinna, at hon hevur ta yvirskipaðu ábyrgdina á kirkjuliga økinum og ábyrgdina av, at umsitingin av økinum fer fram á lógligan hátt. Hon sigur, at ósemjan um prestastarvið í Hvalba snýr seg um eitt starvsfókamál, og tí er álagt myndugleikunum serlig tagnarskylda.

-Tað skal ongin ivi vera um, at eg sjálv, landsstýrismaðurin í fíggjarmálum og landsstýrið gera alt fyri, at vit kunnu finna eina virðiliga loysn fyri allar partar, skrivar landsstýriskvinnan.

Hon leggur afturat, at arbeitt verður við at finna eina loysn á málinum í hesi vikuni.

# Gott ár á fiskamarknaðunum

FISKIVINNA
*Árni Joensen*
*arni@sosialurin.fo*

Árið í fjør royndist sera væl á teimum íslendsku fiskamarknaðunum, og árið var metár bæði í nøgd og virði. Viðskiftablaðið skrivar, at marknaðirnir seldu 103.469 tons í fjør ella 9,8 prosent meiri enn í 2008, tá nøgdin var 94.263 tons.

Vøksturin í virðinum var nógv størri. Í 2008 seldu marknaðirnir fisk fyri góðar 16,9 milliardir íslendskar krónur, men í fjør var hetta talið knappar 21,8 milliardir krónur ella heili 28,5 prosent størri.

Næstan allir fiskaprísirnir hækkaðu í fjør, men høvuðsfrágreiðingin er, at virðið á íslendsku krónuni hevur verið sera lágt tað seinasta árið.

